

# **Messan** í Vági opin aftur

**Síðani fyrst í árinum hevur matstovan Messan í Vági ikki verið regluliga opin, men í gjár lat Messan upp aftur**

**MATSTOVA**

Tað er Jónfríð Hjelm, ið nú letur Messuna upp aftur.

Opið er allan dagin. Á degi fæst kaffi og køkur, og døgurði er frá klokkan 12:00 til 14:00.

Á kvøldi er A la Carte: køkurin er opin frá klokkan 18:00 til 22:00, og grillin frá klokkan 17:00.

Fríggjadag og leygardag er tó opið til klokkan 23:00.

Jónfríð Hjelm sigur, at bæði størri og smærri ferðaløg eru vælkomin, og yvirhøvur fær kundin tað, ið hann biður um.

Barnarættir eru eisini á matkortinum, og lítið spælirúm við sjónvarpi er eisini til børnini.

Umframt hevur Messan sera hugnaliga terassu í vestara enda, har sólargangurin er góður.

# Smyril á **Vági**

**Sjáldsamur gestur vitjaði Vág sunnudagin. Um 12:30 tíðina sigldi Smyril inn á Vág. Ætlanir eru um at nýta Vág sum bunkringshavn, og í dag royndi Smyril bryggjuna við Vágsverkið**

**TÍÐINDASKRIV**

Smyril hevur bunkrað á Sundi, men ætlanir eru um, at framyvir skal Smyril bunkra olju í Vági. Umstøður eru við bryggjuna við Vágsverkið hjá SEV - har stóru oljutangarnir standa, og sunnudagin kom Smyril á Vág at royna umstøðurnar.

Veðrið er av tí fagrasta, og tað sá út til, ot ongir trupulleikar vóru, og væl gekst at koma til og frá. Men hvussu verður við ætlanunum um bunkring í Vági frættist óivað meira um seinni.

Nú hevur Smyril roynt umstøðurnar í Vági, og Smyril gjørdi skjótt av, tí um 13 tíðina fór hann norður aftur á Krambatanga.













